## Toskaaling framtíðin

Ein nýggja kanning í Íslandi vísir, at tað eru stórir møguleikar at alsa tosk inni á firðunum kring landið. Niðurstøðan byggir á nakrar atferðarroyndir hjá toski, sum eru gjørdar á Arnarfirði. Royndirnar vístu millum annað, at verður toskur fóðraður við lodnu, gerst hann støðufastur og stendur tættur, so tað er lætt at veiða hann. Björn Björnsson, fiskifrøðingur, sum stóð fyri kanningunum, sigur við íslendsk bløð, at eftir hansara tykki má niðurstøðan vera, at tað eru ovurstórir møguleikar at ala tosk á íslendskum firðum.



*Kanningar benda á, at íslendingar kunnu ala nógvan tosk (Mynd: Vísir)*

# Hvørt einasta smolt

*- Her er altíð okkurt at gera, sigur Páll, sum hevur arbeitt á smoltstøðini í skjótt 9 ár*



**Páll Sørensen og hini á smoltstøðini í Knúsdali hava lagnuna hjá í milliónatali av smoltum í sínum hondum. Tí er neyðugt at teir alt samdøgrið og alt árið hava eygu við støðuni hjá hvørjum einasta smolti í teimum 12 kørunum. - Ja, her skal ein av sonnum vera ein altmuligmand, sigur Páll**

ALING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

**Kalsoy:** - Hetta er eitt fínt arbeiðspláss. Og so er ein eisini so tætt við heimbygdina, sigur hann við Sosialin.

Páll er ein av royndu monnunum á smoltstøðini í Kalsoynni, sum liggur millum bygdirnar Syðradal og Húsar.

Staðið, har smoltstøðin liggur hevur mong ymisk nøvn. Summi siga Knúksdalur og onnur Knútsdalur, men Páll sigur eitt heilt triðja.

- Her er í fyrsta lagi eingin knúkur, og søguna um at dalurin er uppkallaður eftir Knúti, havi eg eisini hoyrt.

- Vit her hava altíð sagt í Knúsdali – uttan K ella T – av teirri einfaldu orsøk av tað eru so nógvir steinar í fjøllunum omanfyri, sigur Páll við einum brosi.

Smoltstøðin í Knúsdali kallaðist áður Faroesmolt, og hongur navnið framvegis við, hóast hon nú er undir Bakkafrost á Glyvrum.

### Ikki sleingjast runt

Páll Sørensen – ella Páll á Bakka, tey nevna hann - hevur arbeitt her á smoltstøðini í mong ár. Tað gongur nú á níggjunda ári, og hann trívist framvegis væl í tí.

– Tað er gott at ein kann arbeiða á einum og sama staði, og so nær við heimbygdina.

- So sleppur ein undan at sleingjast runt til tey ymisku arbeiðini, sigur Páll, ið veit alt um hetta slagið av arbeiði sum eletrikkari.

Tá vit vitjaðu á smoltstøðini fyrrapartin mikudagin í farnu viku, var hann komin til arbeiðis tríggjar tímar frammanundan.

Skipanin er hon, at hann er á vakt allar teir 24 tímarnar í samdøgrinum í eina viku, og hevur síðani frí ta næstu vikuna.

Vanliga byrjar arbeiðsdagurin hjá Pálli – rættari er helst at siga arbeiðsvikan – klokkan átta um morgunin, tá fyrsta uppgávan er at tryggja sær, at alt er í lagi á støðini.

Eftir at henda fyrsta rundan er liðug, arbeiða teir við ymiskum á støðini teir næstu átta tímarnar, og fara so til hús eitt skifti um ikki okkurt arbeiði skal gerast her og nú.

- Eg fari so aftur á støðina um kvøldið, og eri her alla náttina. Tá kann eg eisini fáa mær ein lítlan blund, sigur Páll, sum einki hevur ímóti at arbeiða einsamallur á nátt.

### Fóðra og reinsa

Arbeiðið á smoltstøðini kann fyri onkran tykjast rættiliga einsligt, keðiligt og kanska eisini langligt.

Men hjá Pálli og hinum starvsfólkunum á støðini er altíð okkurt at takast við, tá